FØROYA STØRSTA BINGO

Heyst-BINGO 89

NÚ GERAST KVØLDINI MYRK ...

— já, og long og er sostatt tíðin komin til at fara undir fasta heyst-BINGO okkara.

Saman við liknandi eydnuspæli um váramar, hevur hetta verið fastur táttur í blaði okkara í skjótt mong ár, og mangir eru teir lutir kring landið, sum hepnu bingovinnarar okkara hava havt áralanga gleði og nyttu av.

Møguleikarnir fyri at vinna eru sjálvsagt ikki óavmarkaðir, men øll, ið bert fáa 10 tøl rætt á hvørjari plátu — og hetta kunnu vera øll — kunnu vera við í lutakastinum um teir fráliku høvuðsvinningarnar. Tey, ið fáa fulla plátu, vinna beinanvegin ein av smærru bingovinningunum og eru harumframt eisini við í lutakastinum um teir stóru høvuðsvinningarnar. Tess fleiri bløð og plátur — tess færri bløð, ið fara burturímillum — tess størri møguleikar fyri at vinna!




RIMMAR VINNINGAR

Teir 4 høvuðsvinningarnir

Vinningarnir gjøgnum øll hesi árini hava verið bæði nógvir og fjølbroyttir og kortini hevur hvørja ferð borið til at funnið uppá okkurt nýtt og spennandi — soleiðis eisini hesuferð. Høvuðsvinningarnir eru:


Frá **AWJ-VIDEO**, Glyvrum

Stríðið um sjónvarpssiggjaramar stendur við og versnar, men vinnarin av hesi **SAKURA ASTRAL-parabolskipanini** man fara at vinna á teimum flestu. Hann fær í einum 16 satelittrásir inn í stovuna, fjarstýring og aut. skift millum vatnrætt og loddrætt — og kortini er hetta ikki størri í rúgvu enn 80 × 90 cm — v/ stativi, klárt at seta upp.



Frá **IDÉ-HÚSINUM**, Tórshavn

Ein heilt øðrvísi vinningur, men so forkunnugur, so forkunnugur, nevniliga henda stak nossliga **frystiboksin við hópi av ti nógva og góða úrvalinum av frystum vørum** úr nýggju matvørudeildini.



BINGO-vinningarnir (heilir 100 Møguligir)




frá nýggja **BR-leikuhandlinum**, Tórshavn

hava vit ætlað teimum smáu burturav — og hepnu bingovinnararnir kunnu sjálvir keypta táð, teimum lýstir, fyri 200 krónur burturav ti stóra og stuttliga **BR-leikuúrvalinum** ella øðrum.

Frá **AWJ-VIDEO**, Glyvrum

Stríðið um hyggjaramar er eitt, annað er stríðið um sjónvarpstólini millum yngri og eldri, nú tað ymsastaðni í landinum eru so nógvar sendingar at velja imillum. Hetta handuga 14" **SANOY-litsjónvarpið** við fjarstýring og alskyns øðrum hentleikum er ti eins hentur vinningur hjá teimum, ið frammanundan hava sjónvarpstól ella ikki.



Tíðindaskriv frá Formula Føroyum

Teldu-virus

Vandi er fyri, at virus herjar millum teldur í komandi viku

Síðani Agatha Christie skrivaði kriminalromanina »Friggjadagur hin 13.«, hevur hendan dagfesting verið óloysandi knýtt at alkyns óhappum — frá minsta breki til ræðuligar vanlukkur.

Enn hevur hetta bert verið yvirtrúgv, men nú er eitt teluvirus komið í ljósmála, ið fer at herja, tá ið tann 13. í einum mánaða er ein friggjadagur, t.d. friggjadag í komandi viku.

»Friggjadagur hin 13.« er bert eitt av mongum virusum. Orðið telduvirus er felagsheitið fyri óynskt, fjald petti av telduforritum, ið av sær sjálvum fara at virka, tá ið ávisar treytir eru loknar. Hesar treytir kunnu t.d. vera, tá ið eitt ávist telduforrit hevur verið nýtt so og so ofta, tá ið teldan hevur verið tendrað so og so leingi, ella tá ið ein ávis nøgd av goymsluni í telduni er nýtt. Møguleikarnir eru nógvir. Frá »meinaleysum« virusum, ið t.d. skriva jólaheilsur á skermin, til »hervilig« virus, eitt nú »Friggjadag hin 13.«, sum strika út øll data á plátugoymsluni í telduni.

Ikki er lætt at siggja, um teldan er smittað av virusi. Teldur, har nógvir brúkarar eru, ella har nógv umbýting av telduforritum millum teldur fer fram, eru mest hóttar. Tað kann t.d. vera á útbúgvingarstovnum, hjá móðurteldum í netverkið og hjá brúkarum, ið nýta »bulletin boards« (telefondatabasa), spøl og tilikt.

Nógv hevur verið skrivað í útlendskum fjølmiðlum um teluvirus; men ongantíð hevur verið so nógv skrivað um hetta sum júst nú, tá friggjadagur hin 13. nærkast. Eitt virus sæst vanliga ikki fyrrenn tað herjar; men tá ið vit á *Formula Føroyum* vita, at »Friggjadagur hin 13.« nærkast, bjóða vit øllum teldubrúkarum, ið nýta PC-dos ella MS-dos, eitt eftirlit, har vit reinsa teldur og teldukerv rein fyri virus, soleiðis at brúkarin ikki missir virðismikil data.

Leggjast skal afturat, at tær mest útsettu teldurnar eru tær teldur, har »piratdisklar« av skipanum eru lagdar inn. Serliga eru tað spøl, ið eru smittuberarar.

Viðmerkjast skal, at tá tað er talan um »original-disklar« av skipanum og spølum, sum eru keypt frá einum góðkendum søluumboði, er eingin vandi á ferð.



15 22 41 68